Atlantic Petroleum

# Ársaðalfundur í P/F Atlantic Petroleum

Við hesum verður innkallað til ársaðalfund í P/F Atlantic Petroleum at vera á Hotel Føroyum við Oyggjavegin, 100 Tórshavn

**týsdagin tann 29. mars 2005 kl. 16.00**

við hesum fundarskrá:
1. Val av fundarstjóra.
2. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári
3. Framløgu av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
4. Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapin og ársfrágreiðing.
5. Val av nevnd. Tveir nevndarlimir standa fyri vali fyri 2. ára skeið, nevniliga Poul Mohr og Petur Even Djurhuus.
6. Val av grannskoðara, ið situr til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.
7. Viðtøkubroytingar.
   Skotið verður upp fylgjandi viðtøkubroytingar:

II. Grein 3 í viðtøkunum verður broytt til hetta innihald:

**§ 3**

**Stk. 1.**
Nevnd felagsins hevur í tíðini til 31. desembur 2009 heimild til í einum ella fleiri umførum við upp til kr. 100 mió. at hækka partapening felagsins. Hækking av partapeninginum kann heilt ella lutvíst fara fram í øðrum virðum enn reiðum peningi, herundir soleiðis,
<u>at</u> felagið í sambandi við hækking í partapeninginum ímóti viðurlagi í partabrøvum yvirtekur annað verandi virki, virksemi ella felag ella partabrøv í øðrum felagi (fusión);
<u>at</u> felagið í sambandi við hækking í partapeninginum uttan viðurlag í partabrøvum tekur við slíkum øðrum virðum.

**Stk. 2.**
Fyri nýtekning av partapeningi við heimild í hesi grein verða annars at galda hesar ásetingar:
1. Partapeningurin fær somu rættindi í felagnum sum verandi partapeningur;
2. Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og eru negotiabul;
3. Partaeigararnir hava onga skyldu at lata partabrøv síni innloysa;

4.a. Fyri nýggju partabrøvini er eisini galdandi henda avmarking í ognar- og atkvøðurættinum til partabrøv í felagnum:
Eingin partaeigari kann eiga meiri enn 20 % av partapeninginum í felagnum og eingin kann greiða atkvøðu á aðalfundi í felagnum við meiri enn 20 % av atkvøðunum. Løgfrøðiligir persónar, ið innanhýsis eru so tætt knýttir hvør at øðrum, at annar hevur avgerðandi ávirkan á viðurskiftini hjá hinum, verða at meta sum ein í mun til hesa ognar- og atkvøðuavmarking, soleiðis at hesir løgfrøðiligu persónar tilsamans bert kunnu eiga og greiða atkvøðu fyri í mesta lagi 20 % í partapeningi.

Sum dømi um slíkt tætt tilknýti millum løgfrøðiligar persónar, ið fevnt er av hesi grein, kunnu nevnast:
- innanhýsis viðurskifti millum partafeløg, ið eftir ásetingunum í § 2 í partafelagslógini eru at meta sum koncernbundin;
- innanhýsis viðurskifti millum aðrar løgfrøðiligar persónar og partafeløg, har hesir aðrir løgfrøðiligu persónar eiga meiri enn ella hava rætt til at greiða atkvøðu fyri meiri enn 50 % av partapeninginum í partafelagnum;

innanhýsis viðurskifti millum almennar stovnar.

5. Nýtekning kann fara fram uttan fortekningsrætt fyri verandi partaeigarar. Ongar avmarkingar galda í fortekningsrættinum hjá nýggja partapeninginum við kapitalhækkingum í felagnum í framtíðini frásæð tí, ið er tilskilað í pkt. 4.a.
6. Partabrøvini eru til støddar kr. 100,00 og multipla av hesum.
7. Tekning fer fram til marknaðarvirði.
8. Við yvirtekning, ger nevnd felagsins frítt av, hvussu tann til tekningar innboðna partapeningsupphædd – ið ikki er teknað við støði í fortekningsrætti – skal býtast millum tey, ið boðið hava sær til at tekna.

II. Sett verður inn nýggj áseting sum grein 3B:

**§ 3 B**

Stk. 1.
Vísandi til heimild til at fremja kapitalhækking eftir áseting í grein 3 í viðtøkunum, so hevur nevndin í tíðini til tann 31. desembur 2009 harumframt í hesum sambandi heimild til í einum ella fleiri umførum at útskriva upp til í mesta lagi íalt 10.000 stk. warrants (partabrævatekningarrættir). Útskriving kann, men nýtist ikki, at fara fram í sambandi við at felagið upptekur ikki-konvertibult obligatiónslán.
Tekning av warrants (partabrævatekningarrætti) skal fara fram til marknaðarvirði ásett eftir nevndarinnar ætli. Partaeigarar felagsins skulu ikki hava forrætt til at tekna útskrivaði warrants (partabrævatekningarrættir). Partaeigarar felagsins skulu heldur ikki hava forrætt til at tekna tey partabrøv, ið verða teknaði við støði í viðkomandi warrants (partabrævatekningarrættum).
Hvørt einstakt eintak av teknaðum warrants (partabrævatekningarrætti) gevir eigaranum rætt til at tekna partabrøv í felagnum fyri eina áljóðandi upphædd á kr. 100,- og svarar hetta til at øll 10.000 eintøk av warrants (partabrævatekningarrættum) geva rætt til at tekna partabrøv á í mesta lagi íalt eini áljóðandi upphædd á kr. 1.000.000,00. Tekning av partabrøvum við støði í warrants (partabrævatekningarrættir) skal fara fram í tíðarbili sum nevndin nærri ásetur í hvørjum einstøkum føri í tíðarskeiðinum frá 1. mai 2005 til og við 1. mai 2010. Tekning av partabrøvum fer fram til tann kurs sum verður ásettur tá viðkomandi warrants (partabrævatekningarrættir) verða útboðin. Tó skal í tekningartreytum vera ásettar fastar reglur fyri, hvussu tekningskursur verður reguleraður um partabrævahækking, partabrævalækking, konvertiblar obligatiónir/-skuldabrøv verða útskrivaðar, fleiri warrants verða útskrivað, óvanliga høgt vinningsbýti verður útlutað ella um felagið verður avtikið í millumbilinum millum at warrants eru útskrivað og partapeningur við støði í teimum verður teknaður.
Tekningarkursur fyri tey partabrøv, teknað verða við støði í teimum teknaðu warrants (partabrævatekningarrættum), má ongantíð fara undir kurs 100.

Annars verða fyri partapening teknaður verður við støði í teknaðum warrants (partabrævatekningarrættum) at galda hesar ásetingar:

1. Partapeningurin fær somu rættindi í felagnum sum verandi partapeningur;
2. Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og eru negotiabul;
3. Partaeigararnir hava onga skyldu at lata partabrøv síni innloysa;
4. Fyri nýggju partabrøvini er eisini galdandi henda avmarking í ognar- og atkvøðurættinum til partabrøv í felagnum:
   Eingin partaeigari kann eiga meiri enn 20 % av partapeninginum í felagnum og eingin kann greiða atkvøðu á aðalfundi í felagnum við meiri enn 20 % av atkvøðunum. Løgfrøðiligir persónar, ið innanhýsis eru so tætt knýttir hvør at øðrum, at annar hevur avgerðandi ávirkan á viðurskiftini hjá hinum, verða at meta sum ein í mun til hesa ognar- og atkvøðuavmarking, soleiðis at hesir løgfrøðiligu persónar tilsamans bert kunnu eiga og greiða atkvøðu fyri í mesta lagi 20 % í partapeningi.

Sum dømi um slíkt tætt tilknýti millum løgfrøðiligar persónar, ið fevnt er av hesi grein, kunnu nevnast:
- innanhýsis viðurskifti millum partafeløg, ið eftir ásetingunum í § 2 í partafelagslógini eru at meta sum koncernbundin;
- innanhýsis viðurskifti millum aðrar løgfrøðiligar persónar og partafeløg, har hesir aðrir løgfrøðiligu persónar eiga meiri enn ella hava rætt til at greiða atkvøðu fyri meiri enn 50 % av partapeninginum í partafelagnum;
- innanhýsis viðurskifti millum almennar stovnar.

5. Ongar avmarkingar galda í fortekningsrættinum hjá nýggja partapeninginum við kapitalhækkingum í felagnum í framtíðini frásæð tí, ið er tilskilað í pkt. 4.
6. Partabrøvini eru til støddar kr. 100,00 og multipla av hesum.

8. Ymiskt

**P/F Atlantic Petroleum**
**Nevndin**